# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


### Føroyska 1. Deild menn

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 15 | 9 | 4 | 2 | 34 | 12 | +22 | 31 |
| 2 | TB | 15 | 9 | 2 | 4 | 35 | 18 | +17 | 29 |
| 3 | 07 Vestur | 15 | 8 | 5 | 2 | 32 | 15 | +17 | 29 |
| 4 | EB/Streymur II | 15 | 6 | 4 | 5 | 25 | 21 | +4 | 22 |
| 5 | Víkingur II | 15 | 6 | 4 | 5 | 23 | 21 | +2 | 22 |
| 6 | HB II | 15 | 7 | 1 | 7 | 27 | 35 | -8 | 22 |
| 7 | AB II | 15 | 6 | 1 | 8 | 22 | 34 | -12 | 19 |
| 8 | NSÍ II | 15 | 4 | 6 | 5 | 22 | 26 | -4 | 18 |
| 9 | FC Hoyvík | 15 | 3 | 5 | 7 | 18 | 27 | -9 | 14 |
| 10 | B68 II | 15 | 0 | 2 | 13 | 9 | 38 | -29 | 2 |

# KÍ fyri áttan

**KVINNUFÓTBÓLTUR** Í einari heldur linligari finalu, ið ikki hevði teir nógvu málkjansirnar, var KÍ betra liðið og vann við einum máli. Men Skála stóð seg kortini væl og kann saktans gerast ein góður avbjóðari komandi árini



Hilmar Jan Hansen

KÍ hevur verið í øllum steypafinalunum hjá kvinnum síðani 1996, uttan í 1998, men meðan liðið hesi árini hevur vunnið øll meistaraheitini síðani 2000 og tilsamans er blivið meistari 11 ferðir, hevur tað borið til hjá skiftandi liðum at tikið klaksvíkskvinnur í steypafinaluni.

Í fjør eydnaðist tað hjá AB og fyri fimm árum síðani hjá B36, so nú var tað so Skála, ið skuldi royna seg. Kvinnurnar hjá Skála, sum í landskappingini eru við í kappingini um silvurplássið, gjørdu eisini ein góðan innsats á ovara vølli í Gundadali, har tær serliga seinna partin av fyrra hálvleiki vístu, at tær bæði kunnu og tora at bjóða av.

KÍ legði betur fyri í dystinum, men liðið kom allíkavæl ikki til so nógvar kjansir, sum tað vanliga ger. Tann størsti var nokk ein roynd á yvirliggjaran, meðan tað í hinum endanum bleiv tosað eitt sindur um, um Skála mundi eiga eitt brotsspark ella ikki. Men dómarin metti ikki, at so var.

Sum tað leið út á fyrra hálvleik, fekk Skála otað seg eitt sindur longur fram á vøllin, og ta síðstu løtuna fyri hálvleik var bólturin nógv á KÍ-hálvuni. Kortini komu ikki nakrir málkjansir burturúr, og tí stóð framvegis 0-0 á nýggju máltalvuni í Gundadali, tá komið var til hálvleiks.

## Rannvá avgjørdi

Í seinna hálvleiki gjørdist meira vindur, og tað var Skála, ið hevði lotið ímóti. Hetta sá út til at darvað, tí síðstu trý korterini kom Skála stórt sæð ikki inn um brotsteigarmarkið hjá KÍ við bóltinum. Hinvegin hevði KÍ bóltin nógv og trýsti, og hóast kjansirnir framvegis vóru fáir í tali, lá í luftini, hvønn veg dysturin fór at koppa.

Størsta kjansin fekk Rannvá B. Andreasen, tá hon 10 minuttir inn í seinna hálvleik kom í góða skotstøðu uttan fyri brotsteigin hjá Skála, og við einum góðum og hørðum skoti sendi hon bóltin dygst innan fyri stongina og í málið til 1-0. Hóast Ata Jacobsen í Skálamálinum tveitti seg, kundi hon ikki røkka bóltinum.

Hetta skuldi eisini vísa seg at gerast avgerandi hendingin í dystinum, tí fleiri mál komu ikki. KÍ sat tungt á spælinum og kom til onkrar hálvar kjansir, meðan Skála ikki megnaði at svara aftur ella av nýggjum at leggja trýst á KÍ. Størsti møguleikin hjá Skála var eitt fríspark ímóti endanum, sum var stutt uttan fyri KÍ-brotsteigin,



